## Landsstýrið stuðlar Vestursahara

Uttanríkispolitikkur Føroya byggir á hugsjónina um, at samljóð og samstarv skal vera millum heimsins tjóðir. Tær eru javnar í metum og skulu sýna virðing og hóvsemi sínámillum. Fremsta endamál Sameindu Tjóða er at tryggja heiminum frið og tryggleika. Føroya landsstýri viðurkennir týdningin av áhaldandi royndunum at tryggja heimsins tjóðum javnbjóðis rætt at útinna sjálvsavgerðarrætt sín. Sameindu Tjóðir viðurkenna, at fólkið í Vestursahara hevur rætt at skipa seg sjálvt, og landsstýrið stuðlar ynskjum teirra at fremja henda rætt í verki. Landsstýrið stuðlar samtyktunum um, at náttúrutilfeingi bert skal útvinnast, um hetta er í tráð við fólksins vilja í Vestursahara, sigur Uttanríkismálaráðið á heimasíðu síni.









*Grímur Kamban liggur aftur við vestaru bryggju í Havn, men á seinastu ferðini kundi gingið rættiliga galið, tá nógvur sjógvur kom inn á verksmiðjuna og seinni bæði fór niður í last og maskinrúm*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Trygdin var ikki í lagi

**- Eg hopi ikki, at skipið loysir aftur, fyrr enn neyðugu ábøturnar eru gjørdar, soleiðis at trygdin umborð er í lagi, sigur Ellintur Abrahamsen, skipari á Tjaldrinum**

TRYGD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ellintur Abrahamsen var skipari umborð á Tjaldrinum á túrinum, tá teir fríggjadagin vórðu boðsendir at koma lemmatrolaranum Grími Kamban til hjálpar.

Trolarin var staddur einar 50 fjórðingar eystur úr Fugloynni, tá teir bóðu um sleip, tí teir høvdu trupulleikar við elektrisitetinum umborð.

Men tá Tjaldrið kom leiðina seinnapartin hendan dagin, sást skjótt, at manningin ikki bert hevði trupulleikar við elektrisitetinum.

Sjógvur var komin inn á verksmiðjuna umborð á Grími Kamban, sum tískil hevði brúk fyri pumpum.

### Ringum standi

Ellintur Abrahamsen, skipari á Tjaldrinum, er fáorðaður um hendingina og støðuna umborð á lemmatrolaranum hendan dagin.

Tó dylur hann ikki, at støðan hjá teimum seks monnunum umborð gjørdist kritisk, sum hann tekur til, tá leygarkvøldið kom.

- Eg haldi, at tit skulu tosa við skiparan, sum var við Grími Kamban hendan túrin. Hann tóktist stak skilagóður, og eg haldi, at tit eiga at tosa við hann, sigur skiparin á Tjaldrinum.

Men Ellintur leggur tó ikki fingrarnar ímillum, tá hann hevur hug at siga sína hjartans meining um, hví støðan gjørdist so kritisk umborð á lemmatrolaranum.

- Skipið og manning høvdu ikki komið soleiðis fyri hendan túrin, um skipið var í betri standi. Var alt, sum tað átti at verið, hevði hetta ikki hent.

### Ikki loysa

Hann sigur bart út, at Grímun Kamban ikki eigur at loysa aftur, fyrr enn neyðugu umvælingarnar eru gjørdar.

- Eg hopi virkuliga ikki, at skipið loysir aftur í tí standi, tað er, tí hetta er als ikki forsvarligt, sigur skiparin á Tjaldrinum, Ellintur Abrahamsen.

**Fakta**

| | |
|---|---|
| Grímur Kamban/ fyrr: | Nøkkvi (Ísland) |
| Smíðiár: | 1987 |
| Smíðistaður: | Akureyri, Ísland |
| Longd: | 40,01 m |
| Breidd: | 8,10 m |
| BRT: | 283 |
| Eigari: | P/F Research |
| Útgerðarmaður: | Aksel Hansen |